# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800




**Bilradio verður sent hósdag kl. 16.05, fríggjadag kl. 8 og leygardag kl. 13**




*Limir í Tórshavnar Golfklubba ynskja nýggja Golfinum vælkoman í klubban, f.v.: Ragnar Isaksen, Óskar Eiriksson, Janus Norðberg og Ólavur Jøkladal avmyndaðir á Velbastaðhálsi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nýggjur í Golfklubbanum




*Viðførisrúmið er 350 litrar, og við baksetrunum niðri verður tað 1.300 litrar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Nýggi VW Golf er nú komin til landið. Bilurin er broyttur og betraður á øllum økjum, bæði hvat viðvíkur koyrieginleikum, ljóðdoyving, trygd og á tekniska økinum. Eisini er hesin bíligari enn forgangarin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í september royndarkoyrdu vit nýggja VW Golf í Reykjavík saman við øðrum motorjournalistum, sum vóru samdir um, at her er talan um ein bil við serligum dygdum.

Líka síðan VW Golf kom á marknaðin fyri meira enn 30 árum síðan, hevur eingin ivi verið um at talan er um ein nýggjan Golf, hvørja ferð teir skifta modell. Hesin nýggi er sætta generatión, og hóast talan er um ein nýggjan Golf, sum er broyttur og betraður á øllum økjum, líkist hann sær sjálvum. Tað at eitt bilmodell broytist so lítið yvir so nógv ár er eitt sjaldsamt fyribrigdi.

Tað er faktiskt eingin annar bilur, ið verður broyttur so lítið í útsjónd sum VW Golf, og talan er um eina succes hvørja ferð. Golfurin heldur sær væl, er tíðarleysur og heldur sera góðan prís sum brúktur. Soleiðis hevur tað verið í meira enn 30 ár.

Tað eru eisini fáir bilar sum hava so fast tak í sínum kundum sum VW Golf. Golfurin hevur síðan hann kom á marknaðin verið tann leiðandi bilurin í sínum klassa, sonevnda Golf-klassanum.

Golfurin hevur eisini nógvar kappingarneytar og nógv at liva upp til. Fyri at hava eina meining um hendan nýggja Golfin, má hann royndarkoyrast. Bilurin er broyttur og betraður á øllum økjum, bæði hvat viðvíkur koyreginleikum, ljóðdoyving og trygd, eins og á tekniska økinum.

Komforturin er sum í einum stórum bili. Hetta vísti royndarkoyringin í Íslandi eisini. Har var nógvur vindur og illveður, men tað hvørki hoyrdist ella merktiskt á bilinum. Tað er heilt einastandandi fyri ein bil í hesi støddini. Kabinan er eisini gjørd í besta kvaliteti heilt níður í smálutir.

VW Golf fæst í útgávunum Trendline, Comfortline og Highline. Hann fæst við